# Vegleiðing um møguleikar fyri endurgjaldi

## til sjúklingar og eftirsitandi hjá sjúklingum í føroyska heilsuverkinum

Føroyska heilsuverkið er nú partur av almennu donsku sjúklingatryggingini 'Patientforsikringen'. Við hesum er tað vorðið munandi lættari hjá sjúklingum at fáa endurgjald fyri skaðar, elvdir av kanning ella viðgerð í føroyska heilsuverkinum. Hetta er eisini galdandi fyri skaðar, sum eru hendir í sambandi við kanning/viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum.

Í vegleiðingini fært tú at vita, hvussu tú fráboðar ein skaða, hvørjar freistir eru galdandi o.s.fr.

***Gev gætur, at sjúklingatrygging einki hevur við kærur at gera.***

*Um tú vilt kæra um eina viðgerð, tú hevur fingið í heilsuverkinum, skalt tú venda tær til **Patientombuddet**.*

*Tú kanst lesa meira um tínar møguleikar at kæra á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum ella á heimasíðuni hjá Patientombuddet.*

## Rætturin til endurgjald fyri skaða av kanning og viðgerð

Sjúklingatryggingin fevnir um skaðar, sum eru hendir í 2012 ella seinni. Henda avmarking er galdandi, tá skaðin er hendur í føroyska heilsuverkinum, ella á útlendskum viðgerðarstað, eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum. Avmarkingin er tó ikki galdandi fyri skaðar hendir í danska heilsuverkinum.

Allar viðgerðir, sum eru framdar av ella eftir ávísing frá løggildum heilsustarvsfólkum og øll viðgerðarstøð, har løggildað heilsustarvsfólk starvast, eru umfatað av sjúklingatryggingini.

Verður fráboðaður skaði viðurkendur, verður endurgjald roknað sambært galdandi lóg um endurgjaldsábyrgd[1].

### Hvat er *ikki* umfatað av endurgjaldsrættinum?

Sjúklingatryggingin fevnir bert um skaðar, sum standast av sjálvari kanningini og/ella viðgerðini. Dømi um støður, har endurgjald *ikki* verður veitt eru:

- Tá skaðin er ein avleiðing av sjúkuni, sum viðgerðin er sett í verk fyri at basa ella linna.
- Tá viðgerðin ikki hevur væntað árin á sjúkuna.
- Tá fíggjarligi missurin hjá sjúklinginum ikki er størri enn 10.000 kr..

***Gev gætur:** Blóð- og gagngevar og frísk fólk, sum luttaka í góðkendum læknavísundaligum royndum, kunnu fáa endurgjald fyri allar skaðar, um so er, at skaðin stendst av viðgerðini.*

### Hvat er umfatað av endurgjaldsrættinum?

Endurgjald kann verða veitt, tá ein av niðanfyri nevndu treytum er lokin:

- Skaðin hevði mest sannlíkt ikki verið hendur, um sama kanning/viðgerð undir somu umstøðum hevði verið framd av einum royndum serlækna.

[1] *Anordning nr. 582 fra 23. juni 2008 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erstatningsansvar.*

- Skaðin er mest sannlíkt elvdur av breki ella óvirkni í tólbúnað, sum er nýttur til kanningina/viðgerðina.
- Skaðin hevði mest sannlíkt ikki verið hendur, um onnur eins munadygg viðgerðartøkni ella –háttalag hevði verið nýtt.
- Skaðin er sera óvanligur og álvarsligur í mun til sjúkuna, sum viðgerðin verður givin fyri, og skaðin er størri enn tað, sum sjúklingurin eigur at kunna tola.

### Serligt fyri gagn- og blóðgevar v.m.

Fyri gagn- og blóðgevar umframt frískar persónar, sum luttaka í læknavísundaligum royndum, verður sum meginregla veitt endurgjald fyri allar skaðar, sum gagn-/blóðgávan ella royndin mest sannlíkt hevur verið orsøk til. Hetta er galdandi uttan so, at onnur orsøk til skaðan er eyðsæð.

Blóðgevarar kunnu eisini fáa endurgjald fyri skaðar, sum íkoma undir flutningi til avtalaða blóðgávu, umframt fyri materiellar skaðar, sum henda í sambandi við blóðgávu, so sum blóðdálkan av klæðum o.tl.. Einki minstamark er fyri endurgjaldi til gagn- og blóðgevar og frískar persónar, sum luttaka í læknavísundaligum royndum, tá skaðin er elvdur av gagn-/blóðgávuni ella av læknavísundaligu royndini.

### Firning

Skaðar skulu fráboðast til Patientforsikringen í seinasta lagi 3 ár eftir, at sjúklingurin varnaðist, ella átti at havt varnast skaðan. Skaðar, sum ikki eru fráboðaðir í seinasta lagi 10 ár eftir, at teir eru hendir, eru tó endaliga firnaðir og tá kann Patientforsikringen ikki veita endurgjald.

Endurgjald verður ikki latið fyri skaðar, sum eru hendir í føroyska heilsuverkinum fyri 1. januar 2012. Sama er galdandi fyri skaðar, hendir í sambandi við kanning/viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum. Avmarkingin er tó ikki galdandi fyri skaðar hendir í danska heilsuverkinum.

## Endurgjald fyri skaðar av heilivági

Sjúklingar, sum fáa kropsligt mein av læknafyriskrivaðum heilivági, hava rætt til endurgjald eftir lógini. Endurgjald verður ikki veitt fyri sálarligt mein.

Verður fráboðaður skaði viðurkendur, verður endurgjald roknað sambært galdandi lóg um endurgjaldsábyrgd[2].

### Treytir fyri at fáa endurgjald

- Talan skal vera um mein (hjáárin), sum fara útum tað, ið sjúklingurin eigur at tola. Hetta merkir, at sjúklingar við álvarsligum sjúkum mugu tola størri og álvarsligari hjáárin enn sjúklingar við minni álvarligum sjúkum.
- Sjúklingurin skal hava havt ein fíggjarligan miss, sum er størri enn 3.000 kr.

***Gev gætur:** Frísk fólk, sum luttaka í góðkendum læknavísundaligum royndum, kunnu fáa endurgjald fyri allar skaðar, um so er, at skaðin stendst av viðgerðini.*

[2] Anordning nr. 582 fra 23. juni 2008 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erstatningsansvar.

## Firning

Skaðar skulu fráboðast til Patientforsikringen í seinasta lagi 3 ár eftir, at sjúklingurin varnaðist, ella átti at havt varnast skaðan. Skaðar, sum ikki eru fráboðaðir í seinasta lagi 10 ár eftir, at heilivágurin varð útflýggjaður, eru tó endaliga firnaðir og tá kann Patientforsikringen ikki veita endurgjald.

Endurgjald verður ikki latið fyri skaðar, sum eru hendir í føroyska heilsuverkinum fyri 1. januar 2012. Sama er galdandi fyri skaðar, hendir í sambandi við kanning/viðgerð uttanlands eftir ávísing frá føroyska sjúkrahúsverkinum. Avmarkingin er tó ikki galdandi fyri skaðar hendir í danska heilsuverkinum.

## Vegleiðing og mannagongd

Øll løggilda heilsustarvsfólk hava skyldu til at vegleiða sjúklingum, sum ynskja at søkja endurgjald frá Patientforsikringen.

Skaði verður fráboðaður við at útfylla serligt oyðublað, sum liggur á heimasíðuni hjá Patientforsikringen undir ‘Selvbetjening’. Oyðubløð fáast eisini frá kommunulækna, sjúkrahúsdeild ella frá løggildum privatstarvandi heilsustarvsfólkum so sum sálarfrøðingum, fysioterapeutum, kiropraktorum v.fl. Oyðubløð kunnu eisini fáast við at seta seg í samband við Heilsumálaráðið umvegis teldupost hmr@hmr.fo ella á tlf. 304050.

*Seinast dagført 09-01-2012 13:44*